# Hús við lágari reising og fundamenti

## Sniðhús, ið lúka øll krøv

SKJÓTAST
BEST
BÍLIGAST



## Fyrimunir við at velja NORÐSETUR sniðhús



- *Styttri byggitíð, lægri rentuútreiðslur.*
- *Ongar eyka úteiðslur til byggitekningar*
- *Norðsetur útvegar og avgreiðir byggiloyvið.*
- *Møguleiki at tillaga tey ymisku sniðini eftir egnum ynskjum.*
- *Húsini kunnu latast keyparanum liðug og klár at flyta inn í, ella sum byggisett.*









**Øll Norðsetur snið kunnu tillagast eftir ynski og tørvi.**

**Húsini kunnu latast lykla-klár, partvíst liðug ella bert liðugt innilokaði.**







430 Hvalvík
Tlf. 422 277
Fax 422 398
E-mail: nordset@olivant.fo
www.nordsetur.fo

# NORÐSETUR HÚS

# Norðsetur hús

**Innihaldsyvirlit:** síða 1


| | |
|---|---|
| Eitt sindur um Norðsetur og okkara mál | síða 2 |
| Snið 80 við 28° takhalli: Plantekning | síða 3 |
| Snið 80 við 28° takhalli: Síðutekningar | síða 4 |
| Snið 80 við 35° takhalli: Plantekningar | síða 5 |
| Snið 80 við 35° takhalli: Síðutekningar | síða 6 |
| Snið 100 A: Plan- og síðutekningar | síða 7 |
| Snið 100 B: Plan- og síðutekningar | síða 8 |
| Snið 100 C: Plan- og síðutekningar | síða 9 |
| Snið 100 D: Plan- og síðutekningar | síða 10 |
| Snið 100 S: Plan- og síðutekningar | síða 11 |
| Snið 114 A: Plantekningar | síða 12 |
| Snið 114 A: Síðutekningar | síða 13 |
| Snið 126: Plantekningar | síða 14 |
| Snið 126: Síðutekningar | síða 15 |
| Snið 128: Plantekningar | síða 16 |
| Snið 128: Síðutekningar | síða 17 |
| Snið 130: Plantekningar | síða 18 |
| Snið 130: Síðutekningar | síða 19 |
| Snið 130 S: Plantekningar | síða 20 |
| Snið 130 S: Síðutekningar | síða 21 |
| Tvørskurður av snið 80, 100 A-S, 115, 130 og 130 S | síða 22 |
| Tvørskurður av snið 126 og 128 | síða 23 |
| Standard útbúnaður | síða 22 |
| Fyrimunir við at lata NORÐSETUR byggja tykkara hús | síða 24 |
| Mannagongd hjá NORÐSETUR í sambandi við bygging. | Baksíðan |


**Vónandi hevur okkurt av hesum sniðunum tykkara áhuga.**

## Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

**Okkara mál eru at byggja hús, sum gerst karmurin um eitt lív við trivnaði og har dentur verður lagdur á at nýta umhvørvisvinarligt tilfar og lága orkunýtslu**.

Við hesum sum útgangsstøði vilja vit vera við til at nøra um lívsgleðina hjá komandi húsaeigarum, so tey ómakaleyst kunnu bygga sítt framtíðarheim. Hetta verður gjørt innan avtalaðar karmar, har dentur verður lagdur á vælbjálvaði hús, umhvørvisvinarligt tilfar og hágóðsku til kappingarførar, fastar prísir.

Komandi ár hava vit 30 ár baki sum framleiðarar av sethúsum, stovnum, hallum og vinnubygningum.

Í framleiðsluhølum upp á gott 3000 m² hava vit framleitt fleiri enn 800 sethús til føroyska marknaðin. Harumframt eru sethús útflutt og uppsett í Týskalandi og í Grønlandi. Á virkinum starvast 18 fólk.

Her verða elementini gjørd av royndum starvsfólkum og við nýtslu av framkomnari tøkni. Framleiðsluútgerðin tekur hædd fyri liðiligari elementframleiðslu, og kunnu vit tí bjóða fram fleiri enn 30 ymisk húsasnið.

Tey flestu av okkara starvsfólkum hava drúgvar arbeiðsroyndir í húsaframleiðslu her á verksmiðjuni, umframt at fleiri av teimum hava staðið í timburlæru hjá okkum.

Vit hava ment 12 húsasnið við lágari reising og fundamenti. Til øll sniðini kunnu gerast tillaðingar av innrætting, vindeygum, viðka við karnappi v.m.

Vit hava í hesi skjótt 30 árini strembað eftir, at húsini frá Norðsetur skulu hava høga góðsku og eru væl bjálvaði, umframt at øll húsini verða bygd innan teir karmar, ið eru avtalaðir, verða í sáttmála við húsaeigararar og við føstum prísi. Hetta gevur húsaeigaranum tryggleika fyri, at størsti partinum av endaliga kostnaðinum er fastur, umframt at peningastovnarnir ikki eftirfylgjandi fáa óvæntaðar kostnaðir at taka støðu til um veiting av ískoytisfígging.



Byggitíðin fyri eitt Norðsetur hús er vanliga millum 3-4 mánaðir í mun til stødd av húsi og veitingum útyvir tað, sumstandardsniðini fevna um. Hetta hevur við sær lægri rentukostnað av byggifíggingini.

Bíligast er at byggja standard snið. Tó eru nógvir møguleikar at tillaga standardhúsini eftir ser-ynskjum. Tað snýr seg bæði um innrætting, val av vindeygum, gólválegging, køksinnrætting v.m.

Eisini sparir byggiharrin útreiðslurnar í sambandi við húsatekningar og umsókn um byggiloyvi.

Samanumtikið kann byggiharrin kenna seg tryggan við eini húsaloysn frá Norðsetur.

**Vit meta okkum at vera bíligastir og skjótastir á føroyska húsamarknaðinum!**

Vinarliga

Nordhaus P/F

Helgi Olsen, stjóri

**Tað er ikki loyvt at nýta tekningar í hesum faldara uttan loyvi frá Norðsetur!**

## Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

Snið 80 við 28° takhalli. Longd 10,30m. Breidd 7,8 m.




# Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

Snið 80 við 28° takhalli. Longd 10,30m. Breidd 7,8 m.











Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

## Snið 80 við 35° takhalli. Longd 10,30 m. Breidd 7,80 m.









## Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

## Snið 80 við 35° takhalli. Longd 10,30 m. Breidd 7,80 m.





# Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

## Snið 100 A. Longd 12,80 m. Breidd 7,8 m



7




# Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

Snið 100 B. Longd 12,80 m. Breidd 7,8 m








# Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

## Snið 100 C. Longd 12,80 m. Breidd 7,8 m









# Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

## Snið 100 D. Longd 12,80 m. Breidd 7,8 m



10




Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

## Snið 100 S. Longd 12,80 m. Breidd 7,8 m






# Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

## Tvørskurður fyri sniðini 80, 100 A-S, 115 og 130






## Tvørskurður fyri sniðini 126 og 128




# Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

## Snið 115. Longd 14,80 m. Breidd 7,80 m




13

# Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

## Snið 115. Longd 14,80 m. Breidd 7,80 m





Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

Snið 126. Longd 13,60m. Breidd 8,50m + 1,80m






Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

## Snið 126. Longd 13,60m. Breidd 8,50m + 1,80m



16

# Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

## Snið 128. Longd 15,50 m. Breidd 8,50 m






Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

## Snið 128. Longd 15,50 m. Breidd 8,50 m











# Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

## Snið 130. Longd 14,50 m. Breidd 7,80 m + 4,30m






# Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

Snið 130. Longd 14,50 m. Breidd 7,80 m + 4,30m





Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

Snið 130 S. Longd 14,50 m. Breidd 7,80 m + 4,30 m






Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

Snið 130 S. Longd 14,50 m. Breidd 7,80 m + 4,30 m





## Tann føroyska byggiloysnin

**Niðanfyri er lýst hvørjar standardveitingarnar eru:**

- ✓ Útsíðurnar eru bjálvaðar við 200 mm steinull
- ✓ Takið er bjálvað við 200 mm við steinull.
- ✓ Ask parket lagt á gólv í køki, stovu og gong.
- ✓ Ask lamet lagt á gólv í kømrum.
- ✓ Myrkar lametflisar lagdar á gólv duri og vásakøki.
- ✓ Vinyl lagt á gólv í bað/wc og á brúsuveggir.
- ✓ Vindeyguni eru frá H-Dygd.
- ✓ Ongi gerikt runt vindeygur og úthurðar.
- ✓ Hvíttpigmenteraði profilbrettir, 15 x 125 mm, til loft.
- ✓ Standard svart aluminiumstak.
- ✓ Vordingborg køkur, hvítur, prísbólkur 2, sí www.vordingborg.com.
- ✓ Standard hvítvørur til køk.
- ✓ Trappur, ½-sving, gjørdar úr furu og lakkeraðar 2 ferðir við klárum lakki.
- ✓ Slættar, hvítar innhurðar.
- ✓ Bað/wc-møbil, 120 cm breitt, hvítt, sí www.dansani.dk.
- ✓ Borð í vásakøki/kajallararúmi við vaskisundirskápi, 180 cm breitt, hvítt, við pláss til vaskimaskinu og turkitrumlu undir borðinum.
- ✓ Elarbeiði verður gjørt sambært krøvum frá SEV.
- ✓ Hiti og sanitet: Einkultur ketil. Radiatorar í øll rúm oh hiti í gólvinum á bað/wc og í duri. Hvítt sanitet og stálvask í køki. Oljutangi latin. Kloakk løgd í kjallaragólv og førd útum kjallaravegg. Útvendug kloakk er ikki við.

*Møguligar broytingar verða avtalaðar sum meir- ella minniveitingar.*

Egnar viðmerlingar:

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

# Norðsetur hús

**Fyrimunir við at lata NORÐSETUR byggja hús tykkara:**

**FASTUR PRÍSUR.**

Tá tú hevur avgjørt at lata Norðsetur byggja fyri teg, kennir tú kostnaðin av tínum komandi heimi áðrenn vit fara undir byggingina. Tú tryggjar teg móti óvæntaðum eykarokningum tá húsið stendur liðugt.

**Lágar hitaútreiðslur.**

Vit hava lagt okkum eftir at bjálva húsini væl og gera tey tøtt móti vindi, so samlaða hitanýtslan liggur á einum lágum støði. Norðsetur hús eru m.a. kend fyri lága oljunýtslu. Eisini kunnu vit leggja inn hitapumpuskipan ístaðin fyri vanligt oljufýr ella fjarhitaskipan, um byggisamtyktin loyvir hesum fyri at minka enn meira um orkunýtsluna og harvið $CO_2$ útlátið.

**Góðar innrættingar.**

Eftir nógvar royndir og samskifti við viðskiftafólk okkara hava vit støðugt tillagað innrættingarnar av okkara standard sniðum, so innrættingin verður so brúksvinarlig sum gjørligt. Serynskir og tillagingar verða gjørdar í hvørjum einstakum føri. Eisini er stórur dentur lagdur á at innrætta lofts-hæddirnar, so mest møguligt pláss fæst at ráða yvir.

**Byggistýring.**



Tá tú keypur eini hús frá Norðsetur, er byggingin í tryggum hondum. Vit gera í hvørjum einstakum føri allar tekningar og søkja kommunalu mynduleikarnar um byggiloyvi í tráð við tær lokalu ásetingarnar í byggisamtyktunum.

Okkara føstu starvsfólk hava drúgvar royndir við okkara byggihátti, og teir úrvaldu undirveitararnir gera teirra arbeiði til lítar. Tann fakliga dygdin hjá okkara starvsfólki og undirveitarum er á høgum støði.

Vit framleiða so nógv sum tilber á virkinum í Hvalvík við framkomnari framleiðsluútgerð og hava neyvt eftirlit við framleiðsluni, uppseting, innrætting, arbeiðinum hjá undirveitarum v.m.

**Skjót bygging.**

Okkara fólk eru serkøn í uppseting av timburelementum og seta húsini á ein neyvan og skjótan hátt eftir einum degi. Eftirfyljandi dagarnar verður húsið liðugtgjørt uttan, og handverkarnir kunnu tá ótarnaðir av veðri og vindi fara í holt við at gera húsini liðug innan.

Stutta byggitíðin hevur við sær lágan rentukostnað. Ongar útreiðslur av tekningarbeiði v.m. minkar harumframt um tann samlaða kostnaðin.

**Við at lata Norðsetur byggja tykkara hús koma tit trygt á mál.**

## Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

25

Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

26

# Tann føroyska byggiloysnin

# Norðsetur hús

## Mannagongd hjá NORÐSETUR í samband við bygging.

**Húsaætlanin verður tilevnað:**

° Brosjýrur og prísir uppá tey standardhús, sum áhugi er fyri, verða send eftir áheitan.
° Á eftirfylgjandi fundi verða spurningar, ynskir og ivamál viðgjørd.
° Avtalað verða tillagingar og ella broytingar til standardhúsið sum meir- ella minniveitingar.
° Grundað á hesi ynskir verður tilboð sent til støðutakan og møguligar broytigar gjørdar.
° Fígging verður fingin til vega.
° Sáttmáli við tíðarætlan, gjaldstreytum v.m. verður gjørdur partanna millum.

Fyrispurningur um húsasnið → Brosjýrur og prísir á standarhúsi verða send → Tilboð verður sent → Tilboð verður tillagað og góðtikið → Sáttmáli gjørdur millum partarnar

**Mynduleikaviðgerð:**

° Við støði í sáttmálanum og tilhoyrandi tilboði og avtalaðum meir- og minniveitingum verða allar neyðugar tekningar gjørdar.
° Umsókn um byggiloyvi verður send til avvarandi kommunala byggimynduleika.
° Málsviðgerðin hjá kommunala byggimyndugleikanum er vanliga 2-3 vikur.
° Norðsetur fær byggiloyvið við treytum, ásetingum v.m., sum er galdandi fyri kommununa og bústaðarøkið.

Húsini verða teknaði sambært ynskjum → Umsókn um byggiloyvi send til mynduleikar → Málsviðgerð hjá byggi-mynduleika → Byggiloyvi við treytum og ásetingum

**Byggingin:**

° Grundin ella fundamentið verður stoypt. Hetta tekur umleið 2 vikur.
° Byrjað verður uppá elementframleiðsluna um somu tíð, sum betongarbeiðið byrjar. Elementframleiðslan á verksmiðjuni í Hvalvík tekur millum 5-6 vikur alt eftir húsasniði.
° Húsið verður sett upp eftir einum degi og gjørt liðugt uttan eftirfylgjandi dagarnar. Hetta tekur vanliga 1½-2 vikur.
° Innrætting, elarbeiðið, hita- og sanitetsarbeiðið, uppseting av loftum, gólválegging, uppseting av køki, trappum og listum v.m. tekur millum 6-7 vikur.

Betong-arbeiðið tekur umleið vikur2 → Element-framleiðslan tekur 5-6 vikur → Uppseting og liðugt-gerð uttan 1½-2 vikur → Innrætting og liðugtgerð tekur 6-7 vikur → Avhending

**NORÐSETUR HÚS - Tann føroyska byggiloysnin.**

# Tann føroyska byggiloysnin